# Bilrøkt við mekaniskum verkstaði og dekksølu

**Sp/f Bilrøkt hevur enn einaferð víðkað sítt virksemi. Seinasta nýggja er ein dekksøla og mekaniskur verðstaður. Vit eru altíð til reiðar við einum góðum tilboði, siga eigararnir Jákup á Borg og Geir Wardum**

BILRØKT
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Geir Wardum og Jákup á Borg, eigarar av Sp/f Bilrøkt í Pedda við Steingøtu*

Síðan Jákup á Borg stovnaði Sp/f Bilrøkt fyri góðum ári síðan, er virksemið hjá fyritøkuni nógv vaksið. Fyritøkan byrjaði við at spesialisera seg í at polera, reinsa og lakkforsegla bilar og at selja brúktar bilar fyri kundar.

Síðan víðkaði fyritøkan tænastuna við eini hjálpar- og flutningstænastu við einum bili, sum fólk kundu ringja eftir alt samdøgrið.

Fyri einum góðum mánað síðan keypti ein annar persónur seg inn í fyritøkuna. Talan er um Geir Wardum, ið hevur hollar royndir innan bilbransjuna og hevur seinastu árini verið leiðari á tveimum Shell servicestøðum.

Í hesum sambandi verður virksemið hjá fyritøkuni aftur víðkað við mekaniskum bilverkstaði og dekksølu.

Mekansiki verkstaðurin tekur sær av smærri umvælingar so sum oljuskiftum, dekkskiftum og balansering. Teir bjóða t.d. eitt pakkatilboð, har teir kanna dekk, olju, ljós, sprinklaravesku og viskarabløð.

Verkstaðurin er útgjørdur við nútímans dekk- og balanseringsmaskinum, og teir skaffa øll sløg av dekkum.

Jákup á Borg og Geir Wardum siga, at teir altíð eru til reiðar við einum góðum tilboði upp á at gera bilin vetrarkláran.

Í sambandi við søluna av brúktum bilum siga teir, at Sp/f Bilrøkt eisini virkar sum ein bilmeklarafyritøka.

Tað at fyritøkan hevur spesialiserað seg í at slípa, polera, reinsa og lakkforsegla bilar, verður nú marknaðarført undir navninum "Car-cosmetic", har teir viðgjørdu bilarnir síggja út sum spildurnýggir - reinir og blankir uttan og innan.

Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.bilrokt.fo ella við at venda sær til Sp/f Bilrøkt, P. við Steingøta 26, tel. 588880 / 588881



*Konseptbilurin Hyundai Arnejs. Enn er ikki avgjørt, hvat endaliga navnið á bilinum verður*

## Nýggjur Hyundai í 2007

Á altjóða bilaframsýningini í Paris fyrst í oktober sýndu Hyundai ein heilt nýggjan bil í miðalklassanum. Talan er um konseptbilin Arnejs.

Bilurin, sum er teknaður á designsentrinum hjá Hyundai í Russelheim í Týsklandi, kemur vændandi á marknaðin miðskeiðis í 2007. Hyundai vænta at økja munandi um sín marknaðarpart í Evropa við hesum bilinum.

Enn er ikki avgjørt, hvat endaliga navnið verður á nýggja bilinum. Talan er um ein hatchback við 5 hurðum
*www.hyundai.dk*

## Hyundai fingu toppkarakter

Í sambandi við eina stóra amerikanska brúkarakanning hjá kvalitets-analysustovninum "J.D. Powers and Associates" komu koreansku Hyundai á eitt fyrsta pláss í bólkinum "vanlig bilmerkir", framman fyri japansk og týsk bilmerkir. Eitt nú var Hyundai Tucson kosin sum feilfríasti SUV í sínum klassa.

Hyundai eru sostatt millum tey bestu bilmerkini, hvat kvaliteti viðvíkur. Brúkararnir skuldu svara upp á 217 spurningar, 90 dagar eftir teir hava keypt bilin. 63.607 fólk luttóku í kanningini.